**Avgerð 3/2008 frá Yvirkærunevndini**

**Hjá**

**Fótbóltsambandi Føroya**

**Viðvíkjandi kæru frá Skála Ítróttarfelag, um úrskurð hjá Aganevndini, dagfest hin 4. okt. 2008.**

Yvirkærunevndin hevur móttikið mál til viðgerðar, har ið Skála Ítróttarfelag viðurkennir at teir hava nýtt ein ólógligan leikara Kjell Johansen, vísandi til avgerð hjá Aganevndini kærumál 16/2008, men gera vart við, at AB hevur í sama dysti leikt við tveimum ólógligum leikarum, nevnliga Fríða Jensen og Teitur Olsen hjá AB.

Aganevndin hevur í úrskurð sínum dagf. 4. okt. 2008 tikið avgerð um, at Skála Ítróttarfelag eftir kæru frá AB hevur nýtt ólógligan leikara í sambandi við dyst fyri 2. deild menn, tann 28. september 2008, og tí verður Skála Ítróttarfelag dømt at tapa dystin.

Aganevndin grundar sína niðurstøðu á, at grein 14, stk. 1, bókstav a og b í Kappingarreglum FSF´s ásetur treytir fyri , nær ein leikari kann metast sum lógligur leikari, sbr. stk. 3, og tí lógliga kann luttaka í lands og steypakappingini. Sambært bókstav a skulu upprunaleikarar hjá einum felagi tilmeldast og skrásetast í leikaraskráseting FSF´s. Ongar undantaksreglur eru, sum geva linna í treytunum fyri, nær ein leikari kann metast sum lógligur eftir grein 14 í Kappingarreglum FSF´s.

Aganevndin metir, at brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF´s. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum er sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin. Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum. Við heimild í grein 8 í Agareglugerðini verður Skála Ítróttarfelag, 2. Deild menn dømt at tapa dystin móti AB hin 28. sept. Fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-0. Sbr. Grein 40 í Kappingarreglum FSF´s.

**Formellar reglur.**

Yvirkærunevndin hevur viðgjørt kæruna frá Skála Ítróttarfelag við heimild í § 11, stk. 4 í agareglugerðini, har tað framgongur, at Yvirkærunevndin tekur avgerðir í kærumálum viðvíkjandi avgerðum hjá Aganevndini, ið ikki eru endaligar.

Sambært § 12, litra f) í agareglugerðini kann ein avgerð frá Aganevndini um, at eitt felag verður dømt til at tapa ein dyst, kærast til Yvirkærunevndina, og skal hetta sambært § 12 verða gjørt innan 5 dagar aftaná at kærarin hevur móttikið úrskurðin.

Skála Ítróttarfelag hevur móttikið úrskurðin frá Aganevndini við telduposti tann 6. okt. 2008. Kæran frá Skála Ítróttarfelag til Yvirkærunevndina er send við telduposti hin 9. okt. 2008, og við telefaks skrivi tann 9. okt. 2008 er kæran grundgivin. Kæran er tí latin inn rættstundis.

**Fakta í málinum.**

Tann 28. september 2008 var dystur millum AB og Skála, 2. deild menn. Kjell Johansen, sum varð skiftur inn í 87. minutti, spælir við Skála Ítróttarfelag, uttan at verða skrásettur í leikaraskráseting FSF´s. Kjell Johansen skorar sambært dómaraseðlinum útjavnandi málið til støðuna 2-2 í 90. minutti, sum var endaliga úrslitið av dystinum. Tann 30. september 2008 kærir AB til Aganevndina, um at Skála Ítróttarfelag hevur nýtt ólógligan leikara.

**Partshoyring.**

FSF skrivstovan sendi tann 9. okt. 2008 kæruna hjá Skála Ítróttarfelag til hoyringar hjá AB.

AB sendi hoyringsskriv við telduposti tann 17. okt. 2008 til Yvirkærunevndina, við svari um, at AB metti ikki at Fróði Jensen, sum er skrásettur í leikaraskráseting FSF´s at verða ólógligan leikara at verða, við tað at hann av misgáum er skrásettur undir eftirnavninum Jacobsen hjá pápanum á dómaraseðlinum. AB metti heldur ikki at Teitur Olsen at verða ólógligan leikara at verða, við tað at felagið hevði sent inn leikaralistar til FSF, har Teitur Olsen hevur verið skrásettur. Eisini er leikarasáttmáli sendur inn til FSF fyri Teitur Olsen í desember 2007.

Yvirkærunevndin sendir við telduposti tann 29. okt. 2008 áheitan til AB um, at skjalprógva at Teitur Olsen er fráboðaður til skrásetingina hjá FSF, sum er greitt frá í omanfyri nevnda hoyringssvari tann 17. okt. 2008, við tað at FSF skrivstovan ikki hevur nakra fráboðan til skrásetingar fyri omanfyri nevnda leikara.

Tann 30. okt. 2008 svarar AB aftur, at teir ikki hava nakað skjal ella váttan frá FSF, sum kann vátta eina skráseting av Teitur Olsen. AB roknar við at hann eigur at standa á onkrun gomlum lista hjá FSF.

Tann 5. nov. 2008 fær Skála Ítróttarfelag bæði hoyringsvarini hjá AB til partshoyring.

Tann 6. nov 2008 fær Yvirkærunevndin svar frá Skála Ítróttarfelag, har ið teir ikki hava nakað at leggja afturat, bert tað at AB og Skála Ítróttarfelag hava sama trupulleika við leikarum, sum ikki eru skrásettir hjá FSF.

Yvirkærunevndin hevur móttikið viðmerkingar frá FSF skrivstovuni til málið. Við telduposti tann 17. okt 2008, har ið greitt verður frá, at Fríði Jacobsen ikki er skrásettur í FSF leikaraskrásetingini, tó er leikari Fríði G. Jensen skrásettur sum leikari hjá AB. Teitur Olsen er ikki skrásettur í leikaraskrásetingini hjá FSF, tó hevur AB sent leikarasáttmála hjá Teiti Olsen til góðkenningar hjá FSF tann 8. januar 2008. Tann 16. okt. 2008 hevur FSF skrivstovan móttikið tey neyðugu skjølini, fyri at fáa sáttmálan góðkendan fyri Teitur Olsen. FSF metir tað verða neyðugt at broyta mannagongd, so at hetta verður avgreitt skjótari. Við telduposti tann 28. okt. 2008 metir FSF at tað er eitt mistak, at sáttmálin hevur ligið síðani 8. januar í ár, uttan at verða avgreiddur. Sáttmálin átti at verið aftursendur til AB vegna vantandi skjøl, og við fráboðan til leikaran um støðuna.

Yvirkærunevndin hevur eisini móttikið teldupost dagf. 31. okt. 2008, har ið FSF skrivstovan hevur leitað eftir leikaralistum hjá AB, og er komin aftur til 3. des 1999, har ið FSF hevur sent

leikaralistar til AB til at hyggja ígjøgnum, og tann 17. des 1999, hevur FSF móttikið listan aftur við viðmerkingum. Á listanum til skrásetingar eru í høvuðsheitum leikarar frá 1989, 1990, 1991 og 1992. Teitur Olsen er ikki við á listanum, men hinir dreingirnir hjá AB frá sama árgangi eru á listanum.

**Avgerð hjá Yvirkærunevndini.**

Yvirkærunevndin tekur undir við Aganevndini um, at skráseting av uppruna leikara er galdandi Kappingarreglur fyri Fótbólt grein 14 a) Leikari, sum av fyrstan tí byrjar at leika fótbólt fyri ávíst felag, skal av viðkomandi felag tilmeldast leikaraskráseting hjá FSF´s. Tá skrivstova FSF´s hevur skrásett leikaran í leikaraskráseting FSF´s, er leikarin at meta sum lógligur leikari hjá viðkomandi upprunafelag til upprunafelagið leysgevur leikaran til annað felag.

Feløgini hava ábyrgd og skyldu smbært grein 14, stk. 2: Feløgini hava ábyrgdina av, saman við tilmelding av liðum, á hvørjum ári at leggja við dagførdan leikaralista fyri allar deildir, tilmeldingin fevnir um til leikaraskráseting FSF´s við upplýsingum um navn, bústað og føðingardag. Skrivstova FSF´s skrásetur leikarar og útflýggjar loyvisbrøv sambært ásetingunum í stk. 1.

Yvirkærunevndin er samd við Aganevndini , um at Skála Ítróttarfelag hevur nýtt ein ólógligan leikara sambært omanfyri nevndu ásetingar í grein 14. Yvirkærunevndin er eisini samd um at hetta er at meta sum eitt álvarsligt brot, og at fylgjan er at Skála Ítróttarfelag verður dømt at tapa dystin.

Sambært § 12, litra f) í agareglugerðini kann ein avgerð frá Aganevndini um, at eitt felag verður dømt til at tapa ein dyst, kærast til Yvirkærunevndina. Yvirkærunevndin hevur heimild, sum kærumyndugleiki, at viðgera málið sum nýtt prógvtilfar í málinum, hóast Aganevndin ikki hevur tikið støðu til spurningin, hvørt AB hevur í sama dysti leikt við tveimum ólógligum leikarum.

Í omanfyri nevnda máli hevur AB sent skriv í sambandi við partshoyring, og hevur FSF skrivstovan móttikið hoyringsskriv frá AB tann 17. okt. 2008, har ið AB greiðir frá at Fríði Jensen av misgáum er skrásettur á dómaraseðilin við eftirnavninum Jacobsen. AB førir fram at skrásetingin er skeiv, við tí grundgeving at eftirnavn pápans er Jacobsen, meðan mamman hevur eftirnavni Jensen.

Viðvíkjandi Teitur Olsen, førir AB fram at AB hevur sent inn leikaralistar til FSF, har Teitur Olsen hevur verið skrásettur. Sambært fyrisitingini hjá FSF, so fyriliggur eingin fráboðan um skráseting til skrásetingarskipan hjá FSF fyri omanfyri nevnda leikara. AB førir eisini fram, at leikarasáttmáli er sendur inn til FSF skrivstovuna í desember 2007 fyri Teitur Olsen, og við tað at teir einki hava hoyrt aftur hevur AB gingið útfrá, at leikaraskrásetingin var í lagi.

Við støði í fakta í málinum, so er Yvirkærunevndin av tí fatan at bæði feløgini hava leikt við ólógligum leikarum. Vísandi til tær formellu reglurnar í grein 14, so eru ongar linnandi umstøður ella undantøk fyri at víkja frá skrásetingarreglum FSF´s. Yvirkærunevndin er av tí fatan, at innsending av sáttmálum ikki kann verða nýtt til skrásetingar til leikaraskráseting hjá FSF, við tað at gyldug skráseting kann bert verða framd sambært áðurnevndu grein 14, har ið skylda og ábyrgd fyri røttu skráseting er hjá feløgunum.

Niðurstøðan er tí greið, at Yvirkærunevndin gevur Skála Ítróttarfelag viðhald í kæru síni, at Teitur Olsen eru at meta sum ólógligir leikari at verða. At Fríði Jensen er skeivt skrásettur á dómaraseðilin er eisini at meta sum eitt mistak og brot á galdandi reglur, og fordømi eru um at talan kann verða um bót í slíkum føri, tó hevur revsingin fyri slíkt brot ikki viðført tap av dysti.

Avgerðin hjá Aganevndini um at Skála Ítróttarfelag verður dømt at tapa dystin móti AB í 2. deild menn verður sett úr gildi, við tað at bæði feløgini verða dømd at hava nýtt ólógligar leikarar. Úrslitið av dystinum verður tí, at hvørki av liðunum fær stig í dystinum tann 28. september 2008.

Tórshavn 11. november 2008.

Birta Biskopstø | Andrass Holm Arge | Jens Erik Magnussen | Sigrun Mikkelsen